Nordic Sustainable Construction

# Læraravegleiðing: 3.2.2 Projektera ein múrsteinsvegg

**Tema**

- Endurvinning
- Verkætlan
- Útsetningsflokkar

**Mælt tíðarskeið**

1 tími og 40 min.



**TIGUL**

Undirvísingartilfar
til skeið um endurnýtslu
av tigulsteinum í bygging

## Innleiðsla

Í hesum tilfarinum skal lærlingurin projektera eina royndarvegg av múrsteini, sum seinni skal byggjast í verkætlanarstovuni og síðani takast niður aftur. Ein serstøk læraravegleiðing er til fyri tann praktiska partin.

Royndarveggurin skal innihalda millum 3 og 5 øki, har hvørt øki umboðar ein útsetningsflokk. Fyrir hvønn útsetningsflokk skal eitt mørtel veljast, sum er hóskandi til at brúka í tí flokkinum. Lærlingurin kann fáa hjálp við at síggja síni svar frá uppgávuni, sum er knýtt til avsnittið 'Design til niðurtøku'.

## Fyrireiking

- Finn útav, hvussu nógv pláss lærlingurin hevur til at byggja royndarveggin í verkætlanarstovuni.
- Umhugsa, um tað gevur meining at integrera hesa uppgávu í ta teoretisku uppgávuna, sum lærlingurin longu skal gera.
- Kanna, hvørji mørtel eru hóskandi at brúka í teimum ymsu útsetningsflokkunum.

## Lærumál

- Lærlingurin kann projektera mørtel, designað til niðurtøku við atliti til ymiskar útsetningsflokkar (F2).
- Lærlingurin kann greiða frá, um eitt mørtel er hóskandi at brúka í eini konstruktión, sum skal kunna skiljast sundur, tá konstruktiónin seinni skal takast niður (V2).
- Lærlingurin kann úttrykkja sína vitan og meining um hóskandi mørtel til konstruktiónir, sum skulu designast til niðurtøku við atliti til ymiskar útsetningsflokkar.

## Innihald og endamál

Endamálið er at fyrireika lærlingin til tann praktiska partin, sum skal fremjast í næsta undirvísingselementi.

# Læraravegleiðing: 3.2.2 Projektera ein múrsteinsvegg

## Uppskot til undirvísingarætlan

<u>Framløga av tilfarinum</u>

- Framløga av tilfarinum, við atliti til endamál og praktiska uppgávu
- .Framløga av uppgávu og lýsing av lokalum avmarkingum í mun til pláss í praksis, avmarkað tal av mørteltypu o.a.

<u>Framleiðsla av projektering</u>

- Lærlingurin framleiðir projekteringararbeiðið av royndarvegginum.
- Lærarin góðkennir tekni- og rittilfar.

## Differentiering

Royndarveggurin kann formast eftir teoretiskum og praktiskum førleikum hjá lærlinginum.

## Afturmelding og meting

Lærarin gevur afturmelding í sambandi við góðkenningina av tekni- og rittilfarinum, har tað verður tryggjað, at lærlingar við góðum førleikum verða avbjóðaðir, og lærlingar við avbjóðingum fáa hjálp.